

# SÁLARFRØÐINGUR TIL BARNAVERNDARSTOVU FØROYA

Barnaverndarstova Føroya søkir eftir sálarfrøðingi til nýtt, avbjóðandi starv. Sálarfrøðingurin skal vera partur av einum ráðgevandi toymi við løgfrøðingi og sosialráðgeva/familjuviðgera á Barnaverndarstovu Føroya.

Barnaverndarstovan ráðgevur barnaverndartænastunum í landinum, landsstýrismanninum á barnaverndarøkinum og samdøgursstovnunum á barnaverndarøkinum.

Harumframt skal sálarfrøðingurin luttaka í arbeiðnum í Fosturforeldraskipanini, sum í løtuni telur 80 familjur kring alt landið.

Sálarfrøðingurin fer at arbeiða bæði á Barnaverndarstovuni og kring alt landið.

Sálarfrøðingurin verður við til at menna barnverndarøkið í landinum og til at skipa fyri førleikamenning við skeiðum o.ø fyri starvsfólki í barnaverndartænastunum og fyri fosturforeldrum. Sálarfrøðingurin skal hava áhuga í gransking á barnaverndarøkinum og skipa so fyri, at starvsfólk í barnaverndartænastunum og fosturforeldur verða kunnað um gransking og vitan um viðgerðarhættir o.a.

## FØRLEIKAKRØV

Sálarfrøðingurin skal:

> gera kanningar og metingar av børnum og ungum
> gera foreldraførleikakanningar
> ráðgeva um og leggja til rættis virkisætlanir fyri børn og familjur saman við málsviðgerunum
> veita børnum, ungum og familjum sálarfrøðiliga viðgerð
> luttaka í tvørfakligum samstarvi
> vera supervisor hjá starvsfólki í barnaverndartænastunum og fosturforeldrum
> vera við til at meta um og góðkenna fosturforeldur
> luttaka í hagtalsarbeiðinum á barnaverndarøkinum
> luttaka í arbeiðinum í netverksbólkum hjá fosturforeldrum

## SETANARVIÐURSKIFTI

Neyðugt er, at sálarfrøðingurin er útbúgvin cand. psych. ella cand. pæd. psych. og hevur áhuga í at arbeiða við børnum og familjum við psykososialum trupulleikum.

Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi starv við fjølbroyttum uppgávum, har tú ert við til at skapa innihaldið í starvinum og at leggja arbeiðsdagin tilrættis. Góður møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

## UMSÓKNARFREIST

Umsókn við prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skal vera:

Barnaverndarstovu Føroya
R. C. Effersøesgøtu 30
100 Tórshavn

í hendi í seinasta lagi tann
**23. november 2007, kl. 12.00**

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Onnu Dam, leiðara, tel. 30 24 95 ella 51 90 82
e-mail: ad@bvs.fo - heimasíða: www.bvs.fo

Barnaverndarstova Føroya er ein felagskommunalur stovnur, sum hevur virkað frá 01.12.2005. Trý fólk starvast á stovninum. Barnaverndarstova Føroya hevur skrivstovu í sama húsi sum Kommunusamskipan Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

REPROZ

Mylnuhúsið



# SØKIR EFTIR LEIÐARA

## SJÁLVSOGNARSTOVNURIN MYLNUHÚSIÐ SØKIR EFTIR LEIÐARA TIL 1. JANUAR 2008.

Mylnuhúsið er ein samskipaður dagstovnur við vøggustovu, barnagarði, útibarnagørðum og frítíðarheimi. Vit taka dagliga ímóti 138 børnum í aldrinum 0 – 9 ár. Í Mylnuhúsinum er pláss fyri, at bæði børn og vaksin kunnu seta síni spor her, vit arbeiða í tí dagliga við okkara eygleiðingarevnum og eru upptikin av, hvat upptekur børnini, fyri síðan at leggja dagin til rættis út frá tí, og leggja vit stóran dent á at varða um øll børnini.

## VIT SØKJA EFTIR LEIÐARA

- Sum ynskir at vera í leiðslutoymi við varaleiðara og deildarleiðara
- Sum á virðiligan hátt kann samstarva við starvsfólk, foreldur og børn.
- Sum kann samstarva tvørfakliga
- Sum kann útføra námsfrøðiligar ætlanir
- Sum er tann sjónligi og samlandi persónur í einum fleirfaldandi og avbjóðandi gerandisdegi
- Sum vil vera drívmegin fyri menningina á stovninum, eisini implementering av teimum yvirskipaðu rammunum s.s. dagstovnalóg v.m.

## VIT VÆNTA, AT TÚ

- Hevur tann námsfrøðiliga førleikan sum miðdepil, eisini vænta vit, at tú vilt seta teg inn í "den integrerende baggrund"
- Hevur evnir til at leggja til rættis, samskifta og fyrisita
- Hevur kunnleika til edv
- Hevur humor og bjartskygni

## VIT BJÓÐA TÆR

- Ein stóran stovn, bæði menniskjaliga og í rúmd
- Ein starvsfólkabólk, sum er væl fyri fakliga
- Glað, opin og forvitin børn
- Ein fleirfaldaðan foreldrabólk og eina jaliga og eldhugaða nevnd
- Leiðaraútbúgving sum byrjar heystið 2008

Meira fæst at vita um Mylnuhúsið á www.mylnuhusid.fo

## LØNAR- OG SETANARVIÐURSKIFTI

- Talan er um fulltíðar starv
- Løn og setanarviðurskifti sambært sáttmála við Kommunala Arbeiðsgevarafelag (KAF) og Føroya Pedagogfelag
- Verður at tola broytingar í starvinum
- Starvið verður frá 1/1-2008.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Annie Joensen, leiðara: 217789.

## UMSÓKNIR

Til starvið, saman við upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 23. november 2007.**

Mylnuhúsið
**Mylnugøta 10**
**FO-700 Klaksvík**

mylnuhusid@mylnuhusid.fo
www.mylnuhusid.fo

creδ 458006